# Nólsoyingar bjóða øllum út u

**Nú ovastevna verður um vikuskiftið, hevur Sosialurin verið ein túr úti í Nólsoy í vikuni og fylgt við, hvussu stákast verður dagarnar uppundir stevnuna**



*Tað er hugnaligt úti á bygd, tá ið veðrið er gott. Nú í vikuni uppundir stevnuna stuttleikaðu hesi bæði sær úti á Malarenda*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

OVASTEVNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrireikingarnar eru í hæddini, og nógv fólk eru í sving. Nólsoyingar sjálvir taka sær av øllum tí, sum hevur við stevnutiltøkini at gera, meðan Tórshavnar kommuna, sum nú eisini fevnir um Nólsoy, hevur sent nógvar stabbar til flaggstengur og flaggstengur út um fjørðin við Rituni.

Soleiðis hevur Ritan seinastu dagarnar skipað fitt av farmi upp í Nólsoy, sum skal verða við til at gera stevnuna so hugnaliga sum gjørligt.

Litaðu perurnar, sum fara at prýða bygdina stevnudagarnar, verða nógv fleiri hesaferð enn áður, og her hevur Havnin eisini givið sítt íkast.

Vanliga hava litaðar perur bert hingið undir Mikkjalsveggi, har minnissteinurin yvir Ova Joensen stendur, og har felags-sangur er vorðin fastur táttur leygarkvøld á stevnuni.

Nú stóra tjaldið, sum áður hevur staðið uppi í skúlagarðinum til almennan dans, er sett upp úti á økinum við flakavirkið, eru perur hongdar upp allan vegin úteftir Malarendavegnum.

Hetta fer avgjørt at seta sín serstaka dám á stevnuna, nú gingið fer at verða millum ytra havnalagið og bygdina.

Bingjur, sum skulu hýsa ymisku tivoli-tiltøkunum, eru komnar út við Rituni og standa nú klárar úti á Nýggjavegi.

Umboð fyri Tórshavnar kommunu hava við borgarstjóranum, Heðini Mortensen á odda, verið í Nólsoy um dagarnar og mett um, hvør tørvurin er, nú ovastevna fyri fyrstu ferð verður hildin í eini bygd, sum hoyrir undir Tórshavnar kommunu.



*Teir eru í holt við at seta stóra tjaldið upp úti á økinum við flakavirkið. Til vinstru á myndini síggja vit Hans Sofus Joensen, vanliga nevndur Ba, sum er bróður Ova Joensen, sála*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Asfaltarbeiði

Í vikuni hava stórir bilar

